

# Takksemið kann valla lýsast í orðum

**Jan Müller**

28.10.2015 - 10:53

Oljan.fo

*Tøkkin fyri norðurlendsku náttuúru- og umhvørvisvirðislønina 2015 kann næstan ikki lýsast í orðum, segði Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður í SEV, tá hann saman við Hákuni Djurhuus, stjóra, tók ímóti virðislønini*

Grøna kósin hjá SEV, vindmyllulundin í Húsahaga og nýggja battaríiskipanin vóru við til at vinna SEV náttúru- og umhvørvisvirðislønina 2015.

Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, segði, at orð neyvan kunnu lýsa tøkkina fyri virðislønina, og hann staðfesti í beinleiðis sjónvarpssending í Norðurlondum, at málið er, at Føroyar verða 100 prosent grønar í 2030.

Fleiri landsstýrisfólk og onnur umboð fyri Føroyar vóru til staðar, tá ið SEV fekk virðislønina. Teirra millum var Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í orkumálum, ið er sera fegin um hesa

norðurlendsku viðurkenningina av grønu kósini hjá SEV, sum landsstýrið eisini hevur felt niður í samgonguskjalið.